# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini um ítróttin á alnetinum: www.sosialurin.fo**

## Óvist um kappingin verður hildin

*Ivasamt er í løtuni, um kappingin fyri bestu kvinnuliðini í norðanlondum verður hildin, tí fleir av londunum hava boðað frá, at leikararnir hava annað at gera um páskirnar*

Jákup Mørk

Tá HB seinasta heyst vann FM heitið í kvinnudeildini, kundu leikararnir fegnast um, at tær samstundis høvdu vunnið sær atgongd til eina kapping har bestu kvinnuliðini í norðanlondum skuldu luttaka.

**Annað at gera**

Ætlanin var nevnliga, at meistararnir úr øllum norðanlondum skuldu luttaka í kappingini, sum eftir ætlan skuldi fara av barkastokki um páskirnar.

Nú er tó óvist, um hetta verður til nakað, og í hvussu so er tykist tað ikki vera sannlíkt, at kappingin verður um páskirnar.

Úr FSF frætta vit frá Ísak Mikladal, aðalskrivara, at orsøkin til hetta er, at um somu tíð, sum NM kappingin ætlandi skuldi vera, verður kapping fyri U-landslið hildin í Týsklandi, og at fleiri av londunum tí-skil hava gjørt vart við, at tað liggur illa fyri at leikarar úr bestu feløgunum skulu vera upptiknir av øðrum uppgávum.

Serliga eru tað finnar, danir og sviar, sum hava gjørt vart við trupulleikan, men síðani hava finnarnir slakað eitt sindur, við tað at teir tykjast vera sinnaðir fyri at finna eina aðra loysn. Sviar og danir tykjast hinvegin ikki at hava nakað ímóti, at kappingin verður avlýst, og tískil hongur alt hetta nú í einum kløNum tráð.



*Seinasta ár kundu HB-kvinnurnar fegnast um FM og atgongd til millumtjóða kapping, men nú er óvist, hvussu verður við hesi kapping.* ***Mynd Álvur Haraldsen***

**Ov skjótir at avlýsa**

Ísak Mikladal sigur víðari, at eftir hansara tykki tykjast hesi londini at hava dekan ov góðan hug til at avlýsa kappingina, ið sum kunnugt eisini varð avlýst seinasta ár.

FSF roynir tó kortini at finna eina loysn, sum allir partar kunnu liva við, soleiðis at kappingin kann verða hildin. T.d. kundi ein møguleiki verið, at næstella triðbesta liðið í landinum luttekur, um so er, at tað ikki liggur fyri hjá besta liðnum.

Sum skilst á lagnum, so eru íslendingar og normenn eisini fyri at finna eina loysn, so enn eru allar vónir ikki sleptar, hóast útlitini kanska tykjast í so døpur í løtuni.

**Stórt bakkast**

Fyri føroyskan kvinnufótbólt má tað í øllum førum metast sum eitt stórt bakkast, um so er, at kappingin verður av ongum.

Seinastu tíðina hevur javnan verið havt á munni, at avbjóðingarnar hjá kvinnuligu leikarunum eru alt ov fáar, við tað at einki A-landslið er hjá kvinnunum. Fellur henda avbjoðingin eisini burtur, er so at siga einasta gularótin horvin, og tá kann gerast torført at ímynda sær, hvussu kvinnufótbólturin skal kunna halda fram.

Seinasta ár sóu vit jú, at kappingin í 1. deild gjørdist álík einum glæntrileiki, har tað at enda einans vóru fýra lið, og skiftust hesi so um at hava frí okkurt vikuskifti og spæla dyst okkurt annað vikuskifti.

## Herfølge styrkir álopið

*Týsdagin varð almannakungjørt Herfølge hevur fingið áleyparan, Chris Hermansen, í hópin*

Jákup Mørk

Flestum kunnugt hevur tað gingið avbera væl hjá Jákupi Mikkelsen og liðfeløgum hansara í Herfølge, men skal ein trúgva flestu serfrøðingum, so fer positiva gongdin ikki at halda fram. Teir eru nevnliga á einum máli um, at Herfølge ikki fer at megna at varveita oddasessin, snøgt sagt tí hópurin ikki er nóg sterkur.

**Keypa avlop**

Í fleiri ár hava teir í Herfølge verið kendir fyri at keypa teir leikarar, sum ikki verða mettir at vera nóg góðir í øðrum feløgum. Nógv eru dømini um leikarar, sum ikki megna at vinna sær fastan sess á øðrum liðum, men sum síðani rættuliga gera vart við seg, tá teir koma til Herfølge, har teir aloftast fáa nógv fleiri minuttir á vøllinum, enn teir gera hjá eitt nú FCK og Brøndby.

Nú hevur Herfølge so keypt enn meira »avlop« frá størru feløgunum, og hesu ferð er talan um áleyparan, Chris Hermansen, eftir at hesin í tvey ár hevur verið í útlegd í AB.

Hesin skifti í sínari tíð til AB, við tað at hann og fyrrverandi Herfølge venjarin, Ole Mørch, ikki kláraður so væl upp sína millum. At byrja við gekk eisini sum eftir ánni hjá honum, og fyrstu 12 dystirnar hjá AB seinasta kappingarár skeyt hann ikki færri enn 15 mál, og lá tá ovast á máltindinum.

Alt hetta broyttist tó, tá FCK gjørdi av, at teir vildu hava táverandi AB venjaran, Christian Andersen, tí hetta viðførdi samstundis, at AB skuldi hava nýggjan venjara. Hesin lutur fall á Ole Mørch, sum annars hevur eitt avbera gott orð á sær, og tá gekst ikki so longur so væl.

Restina av kappingarárinum fekk hann einans 3 mál, og heldur ikki hetta kappingarárið hevur skorist serliga væl hjá áleyparanum.

Nú ætlar hann sær at broyta um hetta, og fyrsta stigið er so, at hann hevur skift felag. Spennandi verður tískil at vita, um tað enn eina ferð eydnast hjá Herfølge at fáa fulla nyttu burturúr einum leikara, sum onnur feløg ikki fáa nakað serligt burturúr.

Ikki verður upplýst, hvussu nógv AB hevur kravt fyri áleyparan, men tað man ikki vera heilt skeivt at gita, at keypsprísurin ikki er serliga høgur, um sammett verður við, hvat onnur donsk feløg rinda fyri sínar leikarar. Og í hvussu er man tað vera sannlíkt, at keypspeningurin er væl lægri enn upphæddin, sum AB á sinni noyddist at rinda Herfølge.



*Ofta leikar hart á framman fyri Jákupi Mikkelsen, men nú heldur leiðslan í Herfølge, at meira skal henda í hinum endanum* ***savnsmynd***

## Grand-Prix í badminton

*Komandi vikuskifti fara badmintonleikarar kring landið aftur á vøllin, tá fyrsta kappingin í 2000 verður hildin*

Jákup Mørk

Leygardagin og sunnudagin verður Grand-Prix kappingin hesumegin ársskftið hildin í badmintonhøllini í Havn

Talan er um kappingar fyri bæði ung og vaksin, og er leygardagurin settur av til tey yngru, meðan tey vaksnu sleppa at royna síni kynstur sunnudagin.

**Skráin**

Kappingarnevndin hjá Badmintonsambandinum hevur sent út tíðindaskriv, har boðað verður frá, nær einstøku leikararnir skulu møta til kappingina.

Leikt verður soleiðis, at yngstu luttakararnir, sum eru tey undir 10 ár, møta í høllini kl. 10.30.

Kl. 13.00 sleppa so tey 10-12 ára gomlu fram at. Børn 12-14 møta kl. 15.00 og tey 14-16 ára gomlu møta kl. 16.30.

Sunnudagin skulu so vaksin og unglingar royna seg, og skulu hesi møta í høllini kl. 13.00.




# Latið ikki børn tykkara sleppa heimlandinum

## Góð nýggjársgáva frá foreldrum til lesandi uttanlands...




## Ella vilt tú vita hvat hendir á pappírinum...




**Gerst haldari av Sosialinum**

Tíðindablaðið sosialurin

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

**ÓKEYPIS**
**Sosialurin rindar postgjaldið**
64

***Prísur fyri haldaragjald í Europa kr. 490,-/ársf.***
***Ella eitt internethald fyri bert kr. 240,-/ársf.***
*Ymiskir prísir fyri lond uttanfyri Europa, ring og hoyr nærri.*

**Móttakari:**

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd/býur:

❑ **Haldaragjaldi í Europa** ❑ **Haldaragjaldi til Internetið**

**Um talan er um eitt internethald, skal e-mailadressan hjá móttakaranum skrivast her:** ____

**Rokning skal sendast til:**

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd/ býur:
Undirskrift:

**Send lepan til Tíðindablaðið Sosialin**